# Bara tann fyrsti undirsjóvartunnilin

*Lógvabrestirnir geltu, tá Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum, klokkan 14.31 hósdagin hin 28. september ár 2000 lat fyrsta skotið fyri Vágatunnlinum av*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum, trýstir á knøttin*

**Mynd: Edvard Joensen**

EDVARD JOENSEN

**Leynar:** So er av álvara farið undir at arbeiða upp á undisjóvartunnilin undir Vestmannasundi. Fyrsta skotið varð latið av hósdagin. Og samstundis boðaði landsstýrismaðurin í samferðslumálum frá, at peningur er settur av á komandi fíggjarlógaruppskoti til seismiskar kanningar undir Leirvíksfirði. Farið verður undir at gera undirsjóvartunnil undir Leirvíksfirði, so skjótt, arbeiðið undir Vestmannasundi er komið so mikið áleiðis, at amboð og vitan kann flytast undir Leirvíksfjørð.

Væl av fólki var komið saman við komandi tunilsmunnan Leynamegin, tá fráboðaða fyrsta skotið skuldi latast av hósdagin. Har vóru tingmenn, løgmaður og landsstýrismenn. Vágatingmenninir og bygdarráðsformenninir í Vágum vóru, sum vera man, komnir at uppliva hesa stóru løtu. Og eisini onnur vágafólk vóru komin til Leynar hendan dagin.

Dávur Reinert Hansen, stjóri í partafelagnum Vágatunnlinum, beyð fólki at koma oman móti berginum, har sjálvt holið ætlandi skal verða. Har greiddi hann eitt sindur frá, hvat hent er, og hvat væntandi fer at henda.

Eftir stutta frágreiðing fór alt fólkið yvir um aftur ánna og oman eftir landsvegnum, har Bjarni Djurholm skuldi trýsta á knøttin, sum loysti skotið av.

Tað ljóðaði ein brestur, og roykur stóð upp frá beninum, meðan mannamúgvan klappaði og skundaði sær niðan aftur móti berginum at síggja, hvussu út sá eftir fyrsta skotið.

Hetta var eitt symbolskt skot, mestsum eitt royndarskot, men tað setti tó hol í veggin, og fólk, tóktust nøgd við, at nú var gongd komin á.

Ein tann fyrsti, sum legði upp í rúgvuna, sum komin var frá skotinum, var vágatingmaðurin Marius Dam. Hann stóð so fegin við einum steini í hondini yvir høvdinum, meðan hin vágatingmaðurin tók mynd av honum til privata myndasavnið. Og tað vóru fleiri, sum nýttu høvið at taka sær ein stein frá fyrsta skotinum í tunnilsarbeiðinum.

Tiltakið endaði við samkomu í smiðuhøllini, har pinnamatur og okkurt frískandi var at fáa. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, nýtti høvið at ynskja øllum tillukku við arbeiðinum, sum nú var byrjað og boðaði samstundis frá, at nú eru pengar settir av til seismiskar kanningar undir Leirvíksfirði, og at har verður farið undir at gera undirsjóvartunnil, so skjótt til ber.



*Fyrsta skotið til undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi er latið av*

**Mynd: Jens Kr. Vang**

# Skálavík í vøkstri

*Væl av fólki er flutt til Skálavíkar seinastu tíðina. Barnagarður og frítíðarskúli eru á veg, men tvørligt er hjá fólki at fáa bústað*

EDVARD JOENSEN

**Skálavík:** Fimm familjur við tilsamans 22 fólkum eru innan stutta tíð flutt til Skálavíkar. Kommunan er í ferð við at gera barnagarð, har eisini frítíðarskúli skal húsast.

Fólk halda tað vera vorðið liviligari í Eystanbygdunum. Í Skálavík er eitt fiskavirki komið upp at standa, og har eru fólk flutt til. Eisini onnur flyta til Skálavíkar. Fólk, sum eru vaksin upp í bygdini og hava verið burtur í ymsum ørindum, koma aftur við familju. Og eisini onkur, sum annars einki genetiskt tilknýti hevur til bygdina, er fluttur til.

Linjohn Christiansen, bygdarráðsformaður sigur, at tað merkist væl í eini lítlari kommunu sum Skálavíkar, at so nógv fólk knappliga flytir til. Men tað merkist eisini á annan hátt enn bara positivt, sigur hann. Onkur teirra, sum flytir, hevur trupulleikar við at fáa bústað.

Ikki soleiðis, at ikki eru hús til hesi fólkini. Men tey eru ikki øll líka løtt at fáa hendur á. Peningastovnarnir eiga hús standandi, sum fólk flutti úr, tá ringast stóð til. Hesi tómu hús, sum fleiri eru rættiliga nýggj, vilja fólk fegin sleppa at leiga. Men tey fáa blankt nei frá peningastovnunum. Tíansheldur eru fólk, sum hava fingið gomul hús í Skálavík, sum tey nú eru farin at byggja uppí, meðan tey nýggju standa tóm.

Sum ein avleiðing av, at ungt fólk við børnum flytir til, er Skálavíkar Kommuna farin undir at gera dagstovn. Kommunan hevur keypt hús í Skálavík, sum skulu hýsa barnagarði og frítíðarskúla.

Pláss er fyri knappliga 20 barnagarðsbørnum, meðan frítíðarskúlin verður fyri børnini upp til fjórða flokk. Tá skálvíksbørn fara í fimta flokk, flyta tey til Meginskúlan á Sandi.

Skálavíkar Kommuna hevur sett leiðara fyri dagstovnin. Tilflytari úr Havn, sum er komin til Skálavíkar, haðani maðurin er ættaður. Hann hevur eisini fingið arbeiði í bygdini, og tey flyta við tveimum børnum.

Linjohn Christiansen, bygdarráðsformaður í Skálavík sigur, at ætlanin er, at eisini børn úr hinum Eystanbygdunum skulu hava møguleika fyri ansingarplássi í barnagarðinum í Skálavík, um eitt nú foreldrini arbeiða á fiskavirkinum í bygdini.

Bygdarráðsformaðurin sigur, at innrættingararbeiðið, sum nú er í gongd í barnagarðinum, verður liðugt fyrsta dagin. Smiðirnir fara út í næstu viku. Síðan hevur leiðarin kallað foreldrini saman, og fara tey so at tapetsera og mála. Sjálv sleppa tey at velja litir og tílíkt, sigur byrgdarráðsformaðurin. Gólválegging og tað, sum har til hoyrir, er keypt og liggur klárt og bíðar eftir álegging.

Linjohn Christiansen, bygdarráðsformaður í Skálavík, roknar við, at um miðjan oktober verður barnagarðurin klárur at taka í móti børnumum.



*Sigrid Joensen, leiðari á barnagarðinum í Skálavík hjálpir handverkarunum at seta húsini í stand*

**Mynd: Edvard Joensen**



# Umvæla ikki bygningarnar

*Hóast ta› er ney›ugt at umvæla bygningarnar, i› hoyra til Landssjúkrahúsi› fyri 208 milliónir, ver›ur einki gjørt vi› hetta næsta ár*

JOHN JOHANNESSEN

Bygningarnir, i› hoyra til Landssjúkrahúsi›, eru so miki› illa farnir, at teir mugu umvælast fyri 208 milliónir fram til 2010.

Hetta vísir ein kanning, sum Almanna- og Heilsumálast‡ri› í 1999 setti í verk.

Men í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001 eru eingir pengar settir av til at umvæla bygningarnar á Landssjúkrahúsinum.

Í 1998 vór›u játta›ar 47 túsund til leigu, vi›líkahald og skattir og í 1999 var hendan játtan 3 túsund. Í 2000 vór›u eingir pengar játta›ir, og í ár er ikki ætlanin at játta naka› til hetta endamál.

Kortini er ætla›a játtanin til bygging og løguframlei›slu fyri 2001 heilar 35 milliónir krónur samanbori› vi› 10 milliónir í 2000.

Av hesari játtan ber til at brúka pening til at umvæla Landssjúkrahúsi›, men kortini ver›ur í fíggjarlógaruppskotinum gjørt greitt, at mett ver›ur ikki, at pláss er fyri t‡›andi umvælingum innan fyri játta›a karmin.

Kortini vísir fíggjarlógaruppskoti› á, ar roknast má vi› einum munandi vi›líkahaldsarbei›i, so bygningarnir ikki forfella uppaftur meira. Hetta ver›ur mett at kosta umlei› 68 milliónir komandi árini.

Men í sama sambandi ver›ur aftur víst á, at ongin serstøk játtan er sett av til endamáli›.

# Hoydal: – Hvør sítt mál – Signar og Tórbjørn

*Tjó›veldisflokkurin fer at hava fund um Tórbjørn Jacobsen-máli› í næstu viku sigur Høgni Hoydal, sum bi›jur allar partar halda høvdi› kalt*

JAN MÜLLER

Nú danska stjófartsst‡ri› hevur heitt á fútan um at reisa ákæru móti Tórbjørn Jacobsen, landsst‡rismanni, hevur landsst‡risma›urin sjálvur heitt á Tjó›veldisflokkin um at vi›gera máli›. Fær máli› rættarligar avlei›ingar er hann tilrei›ar at taka tær politisku avlei›ingarnar. Høgni Hoydal, forma›ur Tjó›veldisfloksins, sum er stæddur í Reykjavík og tí ikki kennir stórvegis til máli›, sigur, at landsst‡risma›urin sjálvur ynskir, at flokkurin vi›ger máli› og hevur eina grei›a stø›u til ta›. -Eg haldi, at hetta er ein konsekvent stø›a hjá landsst‡rismanninum, sum er prísverdug, og fer hann at fáa ta vi›ger› hann hevur bi›i› um.

Tá spurningurin um embætisførsluna hjá Signar á Brúnni í SvF-málinum kom fram herfyri seg›i forma›ur Tjó›veldisfloksins, at var ta› sáddur ivi um embætisførsluna hjá einum landsst‡rismanni, so átti hann at fara frá, me›an máli› var› kanna›.

Vit spurdu Høgna Hoydal, um hann nú fer at bi›ja landsst‡rismannin frá, ver›ur hann ákærdur av fútanum!

– Nú veit eg ikki, hví tit skulu kn‡ta hesi málini saman. Ta› eitt slíkt mál sn‡r seg um er í fyrsta lagi tann løgfrø›iligi og prinsipielli parturin: tvs. ver›ur ta› reist ein ákæra, so má man hava eina grei›a stø›u til ta›. Hitt er tann politiski spurningurin: kemur ein landsst‡risma›ur út í eitt mál, sum sáar iva, um hann kann røkja sítt starv fult út, so skal man taka avlei›ingarnar av tí. Og ta› er hetta vit mugu meta um, um hetta er eitt mál, sum sáar iva um politiska arbei›i› hjá einum landsst‡rismanni sigur Høgni Hoydal.

– At ta› ver›ur reist ákæra móti einum landsst‡rismanni, er ta› ikki ivi nokk?

– Jú, um ákæran ver›ur reist. Men nú vita vit ikki, um ákæra ver›ur reist. Ta› einasta vit vita er, at landsst‡risma›urin sjálvur hevur bo›a› frá, at hann hevur fingi› eitt bræv, og at hann hevur bo›a› frá, at hann er tilrei›ar at taka avlei›ingarnar. Hetta kann man tí als ikki kn‡ta saman vi› máli› um Signar á Brúnni, sum var eitt mál um st‡risskipanarlóg og eitt mál, sum løgtingi›, i› hev›i eftirlit vi› landsst‡rinum, hev›i reist sjálvt.

Høgni Hoydal sigur, at í Signar-málinum var› reistur ivi um hansara embætisførslu, og tá helt hann ta› vera rætt, at landsst‡risma›urin fór frá, me›an máli› var› kanna›. -Hetta máli› sn‡r seg um ein skipara á einum skipi, sum øll vita av er fari› á land, og sum 10 mána›ir aftaná fær eitt bræv frá danska sjófartsst‡rinum um, at teir heita á fútan um at reisa ákæru. Fyri hvat vita vit ikki. Spurningurin her átti at veri›, hví man reisir ákæru 10 mána›ir eftir og sáar hetta nakran iva um ta›, sum landsst‡risma›urin hevur gjørt í síni embætisførslu í landsst‡rinum?

Høgni Hoyal sigur tí, at er hetta ein ivi um embætisførsluna hjá einum landsst‡rismanni, so er ta› ein álvarsligur politiskur trupulleiki. -Ver›ur ein ákæra reist, so hava vit ein prinsipiellan trupulleika, sum sn‡r seg um, hvat man ger, tá ein landsst‡risma›ur kemur uppá kant vi› lógina.

Forma›ur Tjó›veldisfloksins vísir á, at vit hava grei›ar reglur fyri tingmenn men ikki fyri landsst‡rismenn. - Og har hevur landsst‡risma›urin longu sjálvur bo›a› frá, at hann vil taka avlei›ingarnar.

– Nú var Tjó›veldisflokkurin rættiliga avgjørdur í málinum um ákærurnar móti John Petersen, at hann átti ikki at siti› sum landsst‡risma›ur, me›an ta› máli› bleiv kanna›!

– Nú eiga vit ikki at blanda mál saman. Ta› er ein himmalví›ur munur á, um ein landsst‡risma›ur hevur koyrt ov skjótt, um hetta sn‡r seg um smálutir ella álvarsligar ákærur. Ta› vita vit ikki. Ta› ræ›ur um at halda høvdi› kalt og ikki vevja alt saman í ein ellibita.



*Framhald frá síðu 3*

## Flutti til Danmarkar, men dámdi ikki tónleikin

Johannes búsettist í Havn, har hann gav frálæru í violinspæli. Men longu í 1923 flutti hann av landinum og royndi seg sum resturatiónsmusikara í Danmark. Men hann hevði lært ov lítið av klassiskum violinspæli. Tíðin var um at fara frá “Tosellis Serenatu” og “Raffs Cavatina”, sum var vælumtóktur resturanttónleikur tá. Inn kom tónleikur úr New Orleans. swing og jazz, sum honum yvirhøvur ikki dámdi, og sum hann helt seg vera ov gamlan at fara undir at læra at spæla.



## Fór í dokk og bleiv trúlovaður í Rotterdam

Hann fór so út aftur at sigla. Reikaði síðan heimin runt við ymiskum skipum - bert einaferð við donskum skipi. Johannes var m.a. bátsmaður við finska skipinum Kastelholm, sum kom til Rotterdam í 1928 har skipið skuldi í dokk. (Kastelholm varð minusprongt vestanfyri Føroyar í 1942)

Í Rotterdam hitti hann norsku gentuna Hjørdis, sum arbeiddi á norsku sjómanskirkjuni har. Tey blivu trúlovað, og fluttu heim til Føroya í 1931. Giftust í Havn í 1932. Tey byrjaðu at handla í 1933, fyrst í Tróndargøtu, síðan í Dr. Jabobsensøtu.



*Framhald á síðu 7*


| | | |
|---|---|---|
| **Jolly** 1,5 l. | + pant | **9,95** |
| **El´Vital shampoo og balsam** 250 ml. | | **24,95** |
| **Ty phoo tea** 120 brøv (80+50%) | | **22,95** |
| **Burton´s Homeblest** 200 g | | **8,95** |
| **Burton´s Viscount** mint + orange, 8 stk. | | **8,95** |
| **Cadbury´s Crunchie** 2 stk. | | **10,-** |
| **Kemilux sitrón úppvask** 500 ml. | | **7,95** |
| **Ísl. Egg** 10 stk. | | **7,95** |
| **Merrild kaffi** 500 g | | **19,95** |

Í sambandi við 50 ára føðingardagin, leygardagin 30. september, letur handilin aftur kl. 14.00. Vit lata hurðarnar upp aftur kl 15.00 og bjóða til móttøku, við ábiti og klassiskum tónleiki, fram til kl. 17.00. Vælkomin

*Keypmaðurin “úti í Grønlandi”*

Pf. Johannes Andreasen
Grønlandsvegur 16

50 ár

stephanssons hús